


[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 25 - 07 - 2013

# DONG gjørt gassfund eystan fyri føroyska markið

Danska oljufelagið DONG, sum herfyri fekk tillutað tvey leitiloyvi á føroyska landgrunninum, hevur gjørt eitt gassfund eystan fyri føroyska markið. Felagið kunnger í hesi vikuni úrslitið av tveimum brunnum vestan fyri Hetland, einum, sum varð boraður í 2012 og einum, sum varð boraður tíðliga í 2013. Hesin seinni av brunnunum, Cragganmore, er eitt gassfund, meðan hin, Glenrothes var turrur. Nú fer felagið at kanna, um Cragganmore er eitt lønandi fund og kann útbyggjast. DONG er eitt av teimum mest virknu oljufeløgunum vestan fyri Hetland. Felagið er við í fleiri olju- og gassútbyggingum og fundum, sum eru gjørd í økinum. Felagið gjørdi nøkur ár herfyri eitt stórt gassfund í sama øki, kallað Glenlivet. Ætlanin er at byggja hetta fundið út og knýta tað í rørleiðingina, sum verður løgd millum fyrstu gassframleiðslu-eindina vestan fyri Hetland, Laggan Tormore. Hon fer undir framleiðslu í 2014. Møguliga verður ein sjálvstøðug rørleiðing løgd frá fundinum til Hetlands. Nú fara fólkini hjá DONG so at hyggja eftir, um seinasta gassfundið, Cragganmore eisini er vert at byggja út gerast partur a gassframleiðsluni vestan fyri Hetland. DONG ætlar sær av tvífalda sína gassframleiðslu eitt nú við fundum og útbyggingum millum Hetland og Føroyar innan 2020. Komandi ár fer felagið at bora ein brunn tætt við markið saman við Statoil og OMV. Í samrøðu við oljan.fo herfyri segði leitistjórin hjá felagnum, Søren B Andersen, at alt økið millum Føroyar og Hetland er ein týðandi partur av strategiini hjá felagnum komandi árini, og at felagið metir alt hetta stóra økið sum eitt og sama olju- og gassøki. Dong er við í fýra av tilsamans sjey loyvum í Føroyum, harav fyristøðufelag fyri tvey loyvi. Mynd Tað var boriskipið West Navigator, sum fann gassið í økinum millum Hetland og Føroyar. Kortið vísir hvussu virkið Dong er vestan fyri Hetland.